## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Gul til stívt andøvsgul av norði, seinnapartin minni vindur av útnyrðingi. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Fyrrapartin gul til stívt andøvsgul av suðri og yvirhøvur turt, men seinnapartin upp í ein strúk av útsynningi og stundum regn. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og regn ella mjørki av og á. Hitin millum 10 og 13 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Mánadagin gul til stívt andøvsgul av suðri og útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Týsdagin veksur hann vindin upp í hvassan vind ella skrið av suðri og regn. Hitin millum 10 og 14 stig.

# Javni øtast um æltan um vakmyndatól

**Javni øtast yvir tíðindini um, at bústovnur ætlaði at nýta vakmyndatól til ansing av fólki við breki. - Tíbetur segði Datueftirlitið nei, sigur Rúna Sivertsen, dagligur leiðari í Javna**

EFTIRLIT
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*



At ta skal koma upp á tal at brúka vakmyndatól til ansing av fólki við breki hevur skelkað Javna.

Datueftirlitið kunngjørdi 28. august eina avgerð um vakmyndatól á einum bústovni fyri fólk við breki. Málið byrjaði við, at bústovnurin í apríl 2009 vendi sær til Dátueftirlitið fyri at spyrja um reglurnar viðvíkjandi vakmyndatólum. Ætlanin var at seta vakmyndatól upp til nýtslu um náttina, tá bert eitt starvsfólk er til arbeiðis á stovninum.

Upplýst verður í avgerðini hjá Datueftirlitinum, at bæði bústovnurin og Nærverkið ynsktu eina støðutakan frá Dátueftirlitinum til spurningin.

Tíbetur segði Datueftirlitið nei og vísir á, at vakmyndatól í stóran mun eru skerjandi fyri persónliga frælsið, og at vakmyndatól tí eiga at verða nýtt við største varsemi.

- At vakmyndatól yvurhøvur skal koma upp á tal í sambandi við umsorgan av fólki við breki, tekur Javni sum dømi um, at Nærverk ikki hevur nóg stóra virðing fyri menniskjum við breki, og ei heldur tekur atlit til persónliga frælsið hjá fólki við breki, sigur Rúna Sivertsen, dagligur leiðari í Javna.

Felagið Javni minnir eisini Nærverk og politiska myndugleikan á, at bústovnarnir eru heim, og at ikki er vanligt at nýta vakmyndatól heima.

- Er ein persónur við breki soleiðis fyri, at hann ella hon hevur serligan tørv á ansing, má setast inn við fleiri starvsfólkum heldur enn køldum og ómenniskjaligum teknikki, Rúna Sivertsen.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 4 |
| Nuuk | 5 |
| Qaqortoq | -- |
| Ammassalik | 7 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 11 |
| Seyðisfjørður | 9 |
| Tórshavn | 12 |
| Lerwick | 14 |
| Aberdeen | 17 |
| London | 23 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 14 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 18 |
| Keypmannah. | 19 |
| Helsinki | 16 |
| Moskva | 19 |
| Berlin | 22 |
| Warzawa | 20 |
| Kiev | 18 |
| Bukarest | 23 |
| Paris | 27 |
| Madrid | 32 |
| Róm | 30 |
| Malorca | 28 |
| Athen | 28 |
| Malta | 29 |
| Tunis | 31 |
| Beijing | 27 |
| New Dehli | 31 |
| Bangkok | 29 |
| Jakarta | -- |
| Sydney | 20 |
| New York | 21 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 25 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 30 |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 14 |

### LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:



Komandi nátt:



**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 985 hPa. yvir Norðsjónum fer spakuliga í landnyrðing og dýpist. Eitt annað lágtrýst, 992 hPa. í útsynning úr Føroyum grynnist.

**Komandi nátt:**
Lágtrýstið yvir Norðsjónum fer spakuliga í landnyrðing.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 31/08 kl. 06⁰⁰ – 01/09 06⁰⁰. Hitin í gjár: 11,4°
Minsti hiti máldur í september: -0,5° -
Mesti hiti máldur í september: 19,5°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 31/08 kl. 06⁰⁰ – 01/09 06⁰⁰.
Avfallið higartil í september: 0 mm




Javni
– Virkin og virðismikil
www.javni.fo

### VESTFALLSKYRRINDI

27. august – Fyrra kvarter
31. august – Mánin longst frá jørðini
4. september – Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 3. sept | 06:33 | 18:51 | 05:33 | 17:51 | 05:48 | 18:06 | 08:33 | 20:51 | 09:33 | 21:51 | 04:48 | 17:06 | 03:48 | 16:06 | 06:48 | 19:06 | 07:48 | 20:06 | 06:18 | 18:36 | 07:33 | 19:51 |
| 4. sept | 07:09 | 19:27 | 06:09 | 18:27 | 06:24 | 18:42 | 09:09 | 21:27 | 10:09 | 22:27 | 05:24 | 17:42 | 04:24 | 16:42 | 07:24 | 19:42 | 08:24 | 20:42 | 06:54 | 19:12 | 08:09 | 20:27 |
| 5. sept | 07:45 | 20:03 | 06:45 | 19:03 | 07:00 | 19:18 | 09:45 | 22:03 | 10:45 | 23:03 | 06:00 | 18:18 | 05:00 | 17:18 | 08:00 | 20:18 | 09:00 | 21:18 | 07:30 | 19:48 | 08:45 | 21:03 |
| 6. sept | 08:21 | 20:39 | 07:21 | 19:39 | 07:36 | 19:54 | 10:21 | 22:39 | 11:21 | 23:39 | 06:36 | 18:54 | 05:36 | 17:54 | 08:36 | 20:54 | 09:36 | 21:54 | 08:06 | 20:24 | 09:21 | 21:39 |
| 7. sept | 08:58 | 21:18 | 07:58 | 20:18 | 08:13 | 20:33 | 10:58 | 23:18 | 11:58 | - | 07:13 | 19:33 | 06:13 | 18:33 | 09:13 | 21:33 | 10:13 | 22:33 | 08:43 | 21:03 | 09:58 | 22:18 |